Skúlastýrið fyri skúlan í Eysturkommunu

Fundur hósdagin 8. feb 2018

Staður: GøtaTíð: 15.30 til 17.30
Møtt á fundi: Ruth N. Sevdal, Ove Heinesen, Gudny Langgard, Katrin I Gregersen og skrivari Fríðfinnur Johnsson.
Ikki møtt: Hjalti Dalheim og Lív McLeud
Skrá:

1. Undirskriva fundarfrágreiðing
2. Leiðslan kunnar
3. Felagsforeldrafundur – málmenning?
4. Formansfrágreiðingin
5. Ymiskt

ad 1Fundarfrágreiðing undirskrivað

ad 2 Kunnað var um blokkin hjá skúlanum. Somuleiðis um at skúlin kemur at hava sera trongar fíggjarligar karmar hetta árið, um útreiðslurnar av samvirknu talvunum frá seinasta ári verða fluttar til í ár. Eisini var kunnað um, at Helgi Dam Ziska, stórmeistari í talvi, hevur verið í skúlanum og undirvíst í talvi, eisini hevur hann telvað simultantal móti næmingunum í báðum deildunum.

ad 3 Tosað bleiv um, hvat evni vit skuldu hava, og hvønn persón vit skuldu heita á. Avtalað varð, at formaðurin skuldi spyrja Páll Isholm, um hann kundi hava eitt innlegg um málmenning. Avtalað var somuleiðis, at um hann ikki kundi, so kundu vit øll arbeiða víðari við øðrum møguleikum.
ad 4 Formansfrágreiðingin – Avtalað varð, at formaðurin skrivar um tað, sum skúlastýrið hevur arbeitt við, og at skúlin skrivar um virksemið hjá skúlanum.

ad 5